

# Góðu foreldur og avvarðandi

Tit sita nú við lesibókini *Hervør og Høgni í triðja*. Hetta er triðja bókin í røðini um Hervør og Høgna, og vónandi fáa tit gleði av at lesa hana saman við barni tykkara. Endamálið við hesum faldaranum er at kunna tykkum um bókina, og hvussu hon kann brúkast.

Í leiðbeinandi lesiætlanini í føroyskum stendur m.a., at undirvísingin hevur til endamáls:

- *at vekja áhuga og virðing fyri móðurmálinum og tokka til tað*
- *at læra næmingarnar at málbera seg væl og vakurt og at lurta og lesa, so teir verða førir fyri at fata og sjálvir nýta ein beinraknan og skiftandi málburð*
- *at stimbra lesingina og menna evni teirra at fata og ogna sær tey virði, sum eru í skaldskapi*

Vónandi kann henda bókin vera við til at fremja tær ætlanir, sum skúlaverkið hevur fyri barn tykkara.

Endamálið við bókini *Hervør og Høgni í triðja* er at venja lesingina og at skilja tað, ið lisið verður. Í triðja flokki duga flestu av næmingunum rættiliga væl at lesa, men teir, sum enn ikki eru tryggir lesarar, fáa eisini gleði av bókini.

Við bókini er fløga, har allur teksturin er lisin inn. Tryggið tykkum, at barnið fylgir við í bókini, meðan tað lurtar eftir fløguni. Til at hjálpa barni tykkara, eiga tit at lesa nógv fyri og við barninum. Eisini kunnu tit hjálpa barninum við at tosa nógv við tað og ikki minst lurta eftir tí. Hetta økir um málsliga medvitið hjá barninum og gevur størri orðanøgd, sum er grundarlagið fyri góðari lesing. Hin dugnaligi lesarin skilur, hvat hann lesur.

Tá ið vit lesa ein tekst, upplива vit. Teksturin talar til sansirnar og letur upp fyri kenslum, so vit fáa eina uppliving. Hann leiðir okkum inn í ein annan heim, eina aðra tíð og ein øðrvísi hugaheim. Fyri at fáa mest burtur úr hesum, er neyðugt, at barnið er fyrireikað - hevur lisið uppá. Tá ið barnið hevur lisið uppá, kann tað endurgeva heildina í tekstinum, og tá verður lættari at tulka og fáa meiningina burturúr.

Bókin fylgir Hervør og Høgna og vinum teirra eitt skúlaár, bæði heima og í skúlanum. Vit hugsa okkum, at Hervør og Høgni búgva í eini meðalstórari føroyskari bygd, og í flokkinum eru 15 næmingar.

Bókin fylgir árstíðini, og vit hoyra um tiltøk, sum eru ymsar ársins tíðir. Í bókini eru ymisk tekstasløg. Summir partar eru ætlaðir til næmingin at lesa uppá heima og so lesa aftur í skúlanum, meðan aðrir partar eru ætlaðir at viðgera í skúlanum. Her hugsa vit um sangir, uppskriftir av ymsum slag og faktekstir, til dømis síðurnar um fiskarnar.



Eitt frámerki er á síðunum, sum ikki eru ætlaðar til at lesa uppá heima.

Tit foreldur kunnu hjálpa barninum at skilja tekstin við at tosa um orð, orðafelli og ymisku evnini, sum koma fyri í bókini. Evnini eru t.d. happing, ættleiðing, vinfólk, teknmál, deyði, bygd og býur og børn úr ymsum londum.

Vónandi kann bókin geva tykkum íblástur til at gera ymiskt saman við barninum heima, at vitja stovnar ella fara út í náttúruna.

Til bókina eru tvær arbeiðsbøkur. Tær eru soleiðis skipaðar, at flestu næmingarnir kunnu arbeiða sjálvstøðugt við teimum.



HANNIS | 311836

# Hin góða lesiløtan

*Umframt at lesa uppá, kunnu tit skapa aðrar góðar hugnaligar lesiløtur saman við barninum*

- Ger lesiløtuna hugnaliga, tak tær ta tíð, ið krevst. Sløkk útvarpið og sjónvarpið og bíða við at taka telefonina.
- Tað er gott at hava eina fasta lesiløtu saman við barninum, til dømis tá ið tað fer at leggja seg.
- Tað er betri at lesa eitt sindur hvønn dag fyri barninum enn at lesa heilt nógv viðhvørt.
- Minst til ikki at skunda tær, men les róliga, tí so fær barnið gleðina av øllum orðunum og kann steðga tær at spyrja um týdningin av ávísum orðum.
- Barnið kann eisini lesa fyri tær viðhvørt. Hjálp barninum við truplum orðum, men hav tol og steðga, til barnið biður um hjálp.
- Far á bókasavnið ella bið læraran hjálpa tær at finna hóskandi bøkur til barnið.
- Á heimasíðuni hjá Føroya Skúlabóka-grunni, www.fsg.fo, er ein listi yvir viðkomandi bøkur til tey ymisku evnini í bókini.

